# Torleif skal velja Lennart ella Annfinn

*Skráin yvir bólkaspælið verður send feløgunum í hesi vikuni, og hjá kvinnunum verður talan um cup kapping*



*Spurningurin er, hvørt tað verða Annfinn Kallsberg, løgmaður, ella Lennart Johanson, UEFA forseti, sum sleppa at standa undir liðini á Torleifi Sigurðsson 2. juli*

Sambært yvirlitið, sum tað leygardagin varð drigið eftir til kappingina um løgmanssteypið, verður finalan sunnudagin 2. juli. Tá plagar løgmaður at vera gestur hjá formanninum í Fótbóltssambandinum. Í fjør var tað Anfinn Kallsberg, sum var gestur hjá gamla klassafelaganum hjá sær, Torleifi Sigurðsson.

Í løtuni sær tað út til, at møguleiki verður fyri endurtøku frá í fjør. Men sjálvsagt kann nógv broytast. Eitt er orðatakið og veruleikin í, um vit hava lív og heilsuna.

Eitt annað er, um Anfinn Kallsberg framvegis verður løgmaður, tá fyrsti sunnudagurin í juli upprennur. Í politikki er altíð møguleiki fyri, at ein stjórnarleiðari skal fáa ta lagnuna, sum Torleif Sigurðsson fekk í fyrstu atløgu á aðalfundinum leygardagin. Í politiska lívinum hevði ein misálitisváttan á stjórnarleiðaran havt við sær, at øll stjórnin hevði lagt frá sær. Um nevndin í FSF hevði tikið somu avleiðingar, um formaðurin hevði lagt frá sær, varð ikki staðfest leygardagin.

Ein annar spurningur er, um bossurin í Fótbóltssambandinum verður heima, tá løgmaður kemur í Gundadal. Tí sama dag, sum finalan verður í Gundadali, verður finalan í EM kappingini, sum verður í Hollandi og Belgia.

Formaðurin og aðalskrivarin í FSF plaga at vera til staðar við slík høvi, tí tá skipar UEFA fyri fundum fyri leiðararnar í europeisku fótbóltssambondunum. Fundarvirksemið plagar at vera liðugt ein ella tveir dagar undan finaluni, og uttan at vit hava hoyrt meiri um hetta, so ditta vit okkum at rokna við, at formaðurin í FSF fer at vera komin aftur í Gundadal, tá steypafinalan verður. Tað vil siga, at hann fer at hava Anfinn Kalsberg undir liðini í Gundadali ístaðin fyri saman við Lennart Johanson, formanni í UEFA, at hyggja at EM-finaluni.

### Lutakastið

Innleiðandi umfarið í steypakappingini verður spælt á grækarismessu, 12. mars. Tá verða hesir dystirnir: ÍF–AB, Royn–Skáli, LÍF–Fram og TB–EB/Streymur.

Í fyrsta umfarinum, sum verður 19. mars, hevur vinnarin Royn/Skáli heimavøll móti vinnaranum av ÍF/AB (dystur 5), og vinnarin av TB/EB/Streymur hevur heimavøll móti vinnaranum av LÍF/Fram (dystur 6).

Tað verður farið undir bólkaspælið 26. mars, og teir tríggir bólkarnir verða mannaðir soleiðis:

Bólkur 1: VB, NSÍ, Sumba og KÍ.

Bólkur 2: vinnarin av dysti 6, B68, B71 og B36.

Bólkur 3: vinnarin av dysti 5, FS Vágar, HB og GÍ.

Fjórðingsfinalurnar verða sunnudagin 21. mai (hetta er sunnudagurin aftaná at dýri biðjudagur hevur verið fríggjadag. Tá verður eitt umfar í landskappingini). Hálvfinalurnar verða 1. juni og 12. juni, og finalan verður sunnudagin 2. juli.

Av FSF skrivstovuni verður upplýst, at teir longu í dag ella í morgin fara at senda feløgunum skrá yvir, hvussu dystirnir í bólkaumfarinum skulu spælast.

### Kvinnukappingin

Í fjør varð gjørt av at skipa steypakappingina hjá kvinnum sum cup kapping. Tað vil siga, at kvinnurnar kappaðust ikki í bólkum í fjør. Kappingin verður eisini í ár cup kapping allan vegin.

Í fyrsta umfarinum verður spælt soleiðis: GÍ–B71 (1), AB–Skáli (2), Sumba–EB/Steymur (3). Fyrsta umfarið verður spælt 2. apríl.

Í fjórðingsfinaluni verður spælt soleiðis: VB–vinnari 2, B36–vinnari 3, HB–NSÍ og KÍ–vinnari 1. Fjórðingsfinalurnar verða 9. apríl.

Hálvfinalurnar verða 16. og 20. apríl, og sambært yvirlitið frá FSF verður finalan leygardagin 1. juli. Í fjør var finalan sama dag, sum finalan um løgmanssteypið varð spæld.

JH

# Hondbóltur í kvøld

*VÍF skal í kvøld royna at endurvinna fyrstaplássið á stigatalvuni*

JÁKUP MØRK

Ein hondóltsdystur verður leiktur í bestu mansdeildini í kvøld.

Hetta verður tá vestmenningar koma til Havnar, har teir skulu leika móti H71, sum í løtuni liggur á næst niðasta plássinum.

Ikki er annað væntandi, enn at VÍF fer avstað við báðum stigunum, men hetta er eisini tvingandi neyðugt, um teir skulu halda fast í oddastøðuni í landskappingini.

Síðani endaspæliði byrjaði, hevur tað nevnliga ikki skorist so væl hjá teimum, men lítil ivi man vera um, at tvey stig verða sett inn á kontoina í kvøld.

Støðan undan vikuskiftinum framgongur av talvuni niðanfyri.

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 6 | 6 - 0 - 0 | 529 | 450 | 79 | 21 |
| 2 VÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 519 | 416 | 103 | 19 |
| 3 StÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 521 | 451 | 70 | 19 |
| 4 Kyndil | 6 | 4 - 0 - 2 | 508 | 441 | 67 | 15 |
| 5 KÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 432 | 539 | -107 | 7 |
| 6 H71 | 6 | 1 - 0 - 5 | 428 | 508 | -80 | 4 |
| 7 Tjaldur | 7 | 0 - 0 - 7 | 459 | 591 | -132 | 3 |

# Nú fer at nærkast

*Billard: Klaksvíkingar eru klárt á odda í fremstu deildini, men enn kunnu tvørámenn skapa nakað av spenningi*

JÁKUP MØRK

Nú bert heilt fá umfør eru eftir at leika í liðkappingini í billard, bendir alt á, at Klaksvíkar Klubbi verður FM vinnari í ár.

Teir eru ikki færrri enn 20 stig framman fyri nummar tvey, sum er Kaggin. Tó so, tvørámenn, sum eru á triðja plássi hava leikt ein dyst færri enn klaksvíkingar, so nakað av spenningi kann koma í aftur, um Tvørámenn kunnu hála nøkur stig aftur í hesum dysti.

Í botninum liggja Havnar Klubbi, Vágs Billardfelag og Mimir. Her hevur Havnar Klubbi spælt ein dysti fleiri enn hini bæði liðini, og tískil er væl hugsandi, at tað verður Havnar Klubbi, sum komandi ár noyðist niður í aðru deild at spæla.

### 2. deild

Í aðru deild er sera javnt millum tvørámenn og fuglfirðingar. Í løtuni eru tað tó suðuroyingarnir, sum hava munin, men sera javnt er millum liðini, so enn er einki avgjørt í so máta.

Merkisvert er annars, at miðali tá ovastu liðunum í aðru deild er væl lægri enn hjá teimum niðastu í fyrstu deild, so okkurt kundi bent á, at vinnarin av aðru deild fer at fáa tað sera torført, tá teir komandi ár skulu leika í bestu deildini.

Ikki tí, miðaltalið avger ongan dyst, men tað er tó ein góður mátistokkur fyri, hvussu tey einstøku liðini eru fyri.

### 3. deild

Gongst ikki væl hjá Havnar Klubba í bestu deildini, so sær betri út hjá triðju deildar liði felagsins. Teir eru nevnliga á odda í deildini, men hetta er ikki uttan harða kapping frá Kagganum, sum í løtuni er á øðrum plássi. Heldur ikki er stórur munur niður til vágbingar og fuglfirðingar, sum eru á ávíkavist triðja og fjórða plássi, so enn er einki avgjørt í deildini.

Niðast eru Marinestationen, við 28 stigum, meðan Tvøroyrar Billardfelag hevur 31 stig.

## Støðan í 1. deild

| Felag | Dystir | Eygu | Umfør | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Kl. Klubbi | 72 | 19924 | 1040 | 19,15 | 91 |
| Kaggin | 72 | 18576 | 1151 | 16,13 | 71 |
| Tv. Bill.f. | 63 | 17240 | 947 | 18,20 | 67 |
| Havnar Kl. | 63 | 14396 | 1045 | 31,77 | 48 |
| Vágs Bill.f. | 54 | 11318 | 679 | 16,66 | 43 |
| Mimir | 45 | 10608 | 691 | 15,35 | 40 |

## Støðan í 2. deild

| Felag | Dystir | Eygu | Umfør | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Tv. Bill.f. 1 | 63 | 11748 | 973 | 12,45 | 90 |
| Bill.f. Fuglaf. | 63 | 11372 | 980 | 11,60 | 85 |
| Kaggin | 54 | 9362 | 795 | 11,77 | 63 |
| Havnar Kl. | 63 | 8328 | 987 | 8,43 | 48 |
| Vágs Bill.f. | 54 | 7626 | 908 | 7,95 | 48 |
| Tv. Bill.f. 2 | 63 | 7348 | 1034 | 7,10 | 26 |

## Støðan í 3. deild

| Felag | Dystir | Eygu | Umfør | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Havnar Kl. | 54 | 5886 | 805 | 7,31 | 69 |
| Kaggin | 54 | 5478 | 1006 | 5,44 | 63 |
| Vágs Bill.f. | 54 | 6656 | 1124 | 5,92 | 58 |
| Bill.f. Fuglaf. | 54 | 5486 | 889 | 6,17 | 57 |
| Tv. Bill.f. | 45 | 4426 | 856 | 5,67 | 31 |
| Marinestat. | 45 | 4362 | 872 | 5,00 | 28 |



# Nósakapping á Skála

Fyrr í hesum mánaðinum var stór innandurakapping hildin inni á Skála. Kappingin bar heitið Nósakapping, og sum nevniðbendir á, so var tað Føroya Banki, sum stuðlaði tiltakinum.

Hetta er tólvta árið á rað, at kappingin verður hildin, og høvdu ikki færri enn 80 lið boðað frá luttøku.

Kappast varð í øllum yngru deildunum, og eru myndir av vinnandi liðunum vístar á hesum síðum



Kappingina hjá pinkulingum vann HB úr Havn



Newcastle, sum var mannað við havnadreingjum vann piltadeildina



Hesar gentunar úr EB av Eiði vunnu kappingina fyri gentur 10-12 ár



88'ararnir úr Havn vunnu kappingini hjá piltunum



HB genturnar vunnu kappingina hjá 12-14 ára gomlu gentunum



Havnarliðið Kveistrar vann kappingina hjá smádreingjunum



Aston Villa úr Havn vann kappingina hjá gentum 14-17 ár



Hvalvíkingar við Barcelona vunnu dreingjaliðskappingina



Kappingina hjá Unglingum vann Leeds úr Havn